# Steingja posthúsið á Argjum



*Mynd(Hetta er myndin á síðuni): Postverk Føroya letur nú avgreiðsluna á Argjum aftur, og bygningurin verður spakuliga tømdur fyri Postverkinum. Eftir er bert Frímerkjadeildin, men møguleiki er eisini fyri, at hendan deildin flytur einaferð seinni.*

**Fríggjadagin letur postavgreiðslan á Argjum aftur fyri síðstu ferð**

POSTHÚS
*Heri á Rógvi*

Fríggjadagin 10. januar letur postavgreiðslan á Argjum aftur fyri síðstu ferð.

Hetta hendir útfrá teirri einføldu orsøk, at ov fáir kundar vitja Posthúsið á Argjum.

Í skrivi til argjafólk sigur Postverk Føroya, at postavgreiðslan er dýr at reka, og hetta samsvarar ikki við talið av kundum.

– Vit hava tríggjar aðrar postavgreiðslur í Tórshavnar kommunu, og vit meta at geva argjafólki eina góða tænastu við hesum avgreiðslum, sigur Bergur í Garði.

Í løtuni er leiðslan fyri Postverk Føroya í gongd við at hyggja at postavgreiðslunum kring landið; hvussu hesar virka, og hvussu betringar og rationaliseringar kunnu fremjast.

– Ein partur av virkseminum á Argjum er longu fluttur á høvuðsdeildina á Òðinshædd. Millum 1,5 og 2 ársverk hava verið knýtt at avgreiðsluni á Argjum, og hetta spara vit so, sigur Bergur í Garði.

Orsakað av at Postverkið hevur havt trupulleikar við at manna aðrar avgreiðslur, verða starvsfólkini á avgreiðsluni á Argjum flutt á aðrar avgreiðslur at arbeiða.

### Frímerkjadeildin verandi

Eftir í bygninginum á Argjum er fyri so vítt bert Frímerkjadeildin. Henda deild hevur eini hálvtrýss fólk í arbeiði, og deildin verður verandi á Argjum. Hóast Postverkið gott kundi hugsað sær at savna mest møguligt á Óðinshædd, so eru umstøðurnar ikki til at flyta Frímerkjadeildina aðrastaðni.

Postboðini, sum bera post út á Argjum, fara framhaldandi eisini at húsast á Argjum. Eisini boksirnar verða verandi í bygninginum á Argjum.

Postverk Føroya hevur eisini umhugsað at savna fyrisitingina á Argjum, men hesar ætlanirnar eru sleptar, tí alt postvirksemið verður framhaldan á Óðinshædd, og ynskiligt er at hava alt á einum stað.

Í aðrari grein á síðuni ber til at lesa meira um ætlanirnar við sjálvum bygninginum.

### Gott ár

Spurdur um farna árið, sigur postverkstjórin, at teir skulu ikki klaga.

– Vit hava sum onnur merkt stagneringina við minkandi aktiviteti í samfelagnum, men okkara rakstur hevur verið betri enn væntað, sigur Bergur í Garði.

Hann dugir ikki enn at siga, hvussu tey heilt greiðu tølini hava verið, men hóast teir ikki kunnu tosa um stóran vinning, so letur hann væl at.

– Vit hava fingið nýggj virkisøki, eitt nú við skundfluttningi í samstarvi við DHL, og hetta hevur givið okkum heilt fitt av inntøku, sigur Bergur í Garði.

# Virðismikil bygningur

**Bygningurin hjá Postverkinum á Argjum telist mestur millum teir meira virðismiklu og áhugaverdu bygningarnar í høvuðsstaðnum**

BYGNINGUR
*Heri á Rógvi*

Bygningurin, sum Postverkið húsast í á Argjum, verður spakuliga tømdur. Enn arbeiða tó eini hálvtrýss fólk í bygninginum – á frímerkjadeildini.

Hesi hevur Postverkið ikki møguleikan at flyta aðrastaðni sum støðan er nú, men hetta er nakað, Bergur í Garði, stjóri fyri Postverk Føroya, væl kundi hugsað sær.

– Tað er natúrligt fyri okkum, at vit hava alt virksemi á einum stað. Vit eru tó ikki sinnaðir til at gera umbyggingar á Óðinshædd, soleiðis at bygningurin verður ein umsitingarbygningur. Hetta vildi verið óðamannaverk, sigur Bergur í Garði.

Gamla Idé Húsið á Óðinshædd virkar sum stóri postsentralurin hjá Postverki Føroya, og har húsast eisini ein partur av fyrisitingini hjá Postverki Føroya.

Stjórin fyri Postverkið vil heldur hava ein minni bygning afturat til fyrisitingarlig endamál enn at umbyggja verandi høli.

Her hevur Tórshavnar kommuna verið inni í myndini. Tórshavnar kommuna er áhugað í bygninginum hjá Postverkinum á Argjum til Argja skúla, men enn hevur talan bert verið um áhuga. Tosað hevur eisini verið um okkurt slag av gerðabýti, har Postverkið fær møguleikan at byggja uppi á Óðinshædd.

Greitt er eisini, at eisini onnur hava áhuga fyri bygninginum hjá Postverkinum á Argjum.

Tað er heldur ikki so løgið, at fleiri vísa áhuga. Talan má í síðsta enda vera um ein ógvuliga áhugaverdan bygning í høvuðsstaðnum – kanska ein tann mest áhugaverda, nú líkt er til, at hann væl møguligt verður settur til sølu í næstum.

Bygningurin er 2.000 fermetrar til støddar, og hann liggur væl fyri á Argjum við frálíka góðum parkeringsviðurskiftum.

Ilt er at meta um, hvat ein tílíkur bygningur er verdur. Hann er tjúgu ára gamal, og við árunum er hann sjálvandi slitin eitt sindur.

Bergur í Garði sigur, at talan er um eitt kvalitet bygning í allar mátar. Hann metir, at skuldi teir bygt ein nýggjan sama slag bygning, vildi hesin kostað 20.000 kr./fermetur.

Falda vit so kostnaðin og fermetratal fáa vit 40 mió. Hetta verður bygningurin kanska ikki seldur fyri í dag, men atraktivur er hann uttan iva fyri onnur enn Tórshavnar kommunu. Higartil hevur Postverkið fingið nakrar fyrispurningur.

Bergur í Garði sigur, at hann ætlar ikki at lata bygningin standa tóman, og nú ein stórur partur verður tøkur, har postavgreiðslan húsaðist.

### Vil hava pening

Nú Postverk Føroya stendur við einum virðismiklum bygningi, sum teir sannlíkt fara at selja, so vil postverkstjórin hava ágóðan av søluni, t.e. at Postverk fær peningin fyri søluna heldur enn landskassin.

– Tað er ikki við mín góða vilja, at landskassin fær peningin av einari sølu av bygningini á Argjum. Hann eigur Postverkið, og tað eru vit, sum hava umsitið og viðlíkahildið, sigur Bergur í Garði.

Postverkstjórin vil ikki kanna sær bitan ov tíðliga, men hann vil tó siga, at hann metir søluna av bygninginum á Argjum kunnu gerast ein týðandi vinning fyri raksturin av Postverki Føroya.

Stjórin ger púra greitt, at hann ongar ætlanir hevur um at lata bygningin standa tóman, nú flytast skal úr einum stórum parti av honum, og tí kann eitt møguligt leigumál lættliga koma upp á tal.



UTTAN ÚR HEIMI

# Friðarráðstevna í vanda

**Ætlanin var at halda eina friðarráðstevnu um Miðeystur í London í næstu viku, men nú er vandi fyri, at hon verður av ongum, tí ísraelsmenn hava sýtt palestinum at taka lut á ráðstevnuni**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Tað var sunnukvøldið, at tann sokallaða trygdarnevndin hjá ísraelsku stjórnini samtykti at banna palestinum at taka lut á ráðstevnuni í London, sum bretska stjórnin skipar fyri. Avgerðin varð tikin eftir tær báðar sjálvmorðsbumbuatsóknirnar í Tel Aviv sunnudagin, sum kostaðu 22 mannalív og særdu meiri enn hundrað fólk.

Bretska stjórnin er illa við av ísraelsku avgerðini. Talsmaðurin hjá Tony Blair, forsætisráðharra segði í gjár, at halda ísraelsmenn fast um avgerðina, er tað ein spurningur, um tað yvirhøvur loysir seg at halda ráðstevnuna.

Jack Straw, uttanríkisráðharri er sera harmur um ísraelsku avgerðina. Hann fordømdi mánadagin sjálvmorðsatsóknirnar í Tel Aviv, men mælti samstundis ísraelsku stjórnini til at umhugsa sína avgerð eina ferð afturat.

Sambært bretskum fjølmiðlum tosaði Straw í telefonini við ísraelska uttanríkisráðharran, Benjamin Netanyahu, mánadagin, og samrøðan skal hava verið rættiliga hvassorðað. Millum annað skal Netanyahu hava sagt, at tað ber ikki til at tingast við leiðarar, sum hava samband við yvirgang. Ísraelski uttanríkisráðharrin skal eisini hava biðið bretar spegla sær í amerikansku stjórnini og hennara uppfatan av tí, sum hendir í Miðeystri. Straw skal hava svarað, at ístaðin fyri at stríðast ímóti yvirgangi, hevnir Ísrael seg inn á palestinskar umboðsmenn.

Ætlanin við ráðstevnuni er at umrøða neyðugar nýskipanir innan palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnar og at tosa um eina varandi loysn av ófriðinum, sum nú hevur staðið við í 27 mánaðir. Tony Blair hevur boðið fleiri palestinskum leiðarum, men ikki Yasser Arafat, á ráðstevnuna. Harumframt hava umboð fyri ST, ES, USA og Russland fingið innbjóðing at koma til London.



*Síðani sjálvmorðsatsóknirnar í Tel Aviv sunnudagin hava ísraelsmenn søkt at málum í Gaza. Hendan myndin er úr flóttafólkaleguni Rafah aftan á eitt ísraelskt álop*

*Mynd: Reuters*

# Norsku skipasmiðjurnar í trupulleikum

**Norsku skipasmiðjurnar hava munandi færri bíleggingar enn vanligt, og tær flestu hava bert arbeiði ein part av hesum árinum**

SKIPASMÍÐ
*Árni Joensen*

Tað var tann tíð, tá stjórarnir á teimum norsku skipasmiðjunum máttu hava fleiri álmanakkar fyri at halda skil á teimum nógvu bíleggingunum, men soleiðis er ikki longur. Á næstan øllum skipasmiðjunum nýtist stjóranum ikki meiri enn tann eina álmanakkan, og tað er tann fyri hetta árið.

Felagið hjá norsku tøknifyritøkunum sigur, at í fjør fingu skipasmiðjurnar bíleggingar fyri 3,6 milliardir krónur, meðan tær hava orku til at byggja fyri einar 10 milliardir krónur. Árið í fjør var kortini frægari enn 2001, tá bíleggingarnar vóru 1,6 milliard krónur, men kortini at kalla einki samanborið við 2000, tá skipasmiðjurnar fingu bíleggingar fyri heilar 33 milliardir krónur.

Úrslitið er, at næstan allar skipasmiðjurnar verða lidnar við sínar bíleggingar í hesum árinum. Bara tríggjar hava arbeiði, sum røkkur út um næsta ársskiftið. Á onkrum skipasmiðjum verða tey liðug við bíleggingarnar longu í vár, og summar hava longu ávarað arbeiðsfólkið um, at neyðugt verður at koyra fólk til hús. Eitt nú hevur tann gamla Ulstein-skipasmiðjan varskógvað 150 av sínum arbeiðsfólkum um, at tey kunnu verða uppsøgd.

Felagið hjá tøknifyritøkunum sigur, at orsøkirnar til ta vánaligu støðuna eru fleiri. Í fyrsta lagi er áhugin fyri oljuleiting í norskum øki munandi minni, enn hann hevur verið, men tann sterka norska krónan og tann høga rentan hava eisini sína ávirkan, sigur felagið. Tað ger heldur ikki støðuna betur, at lønin hjá teimum, sum arbeiða á skipasmiðjunum, er hækkað rættiliga munandi seinastu árini, og at tann almenni stuðulin til skipasmíð er tikin av.

Stutt fyri jól sendu skipasmiðjurnar vinnumála-ráðnum í Oslo eitt bræv um støðuna, men enn hava tær ikki frætt aftur haðani.

## FBI hildið fyri gjøldur

Seinastu fjúrtan dagarnar hevur amerikanska samveldisløgreglan FBI leitað eftir fimm arabiskum monnum, sum sambært myndugleikunum høvdu sníkt seg inn um markið úr Kanada.

Nú vísir tað seg, at har vóru eingir menn at leita eftir, tí søgan var íspunnin. Sambært sjónvarpinum ABC var tað ein maður, sum situr í einum fongsli í Kanada, sum hevði funnið upp á søguna.

Amerikansku myndugleikarnir kunngjørdu stutt fyri jól, at teir leitaðu eftir teimum fimm arabisku monnunum, og FBI bað almenningin hjálpa sær at leita. Tíðindini høvdu eisini við sær, at trygdartiltøkini vórðu herd, tí FBI stúrdi fyri, at menninir kundu vera yvirgangsmenn.

## Lærarar gevast

Lærararnir í enska fólkaskúlanum hava so nógv at gera, at triði hvør teirra umhugsar at gevast tey næstu fimm árini.

Meiri enn helmingurin av teimum 70.000 lærarunum, sum hava tikið lut í einari kanning, siga, at arbeiðshugurin er ikki so góður nú, sum hann var, tá teir byrjaðu sum lærarar, og triði hvør ætlar at fara úr skúlanum. Av teimum ætla helmingurin at fara frá við eftirløn, meðan hin helmingurin ætla at finna sær annað arbeiði.

Ein áhugabólkur hjá ensku lærarunum, sum hevur staðið fyri kanningini, sigur, at tann veksandi arbeiðsbyrðan er orsøkin til, at lærararnir trívast ikki í fólkaskúlanum. Úrslitið av kanningini er kunngjørt, júst sum Charles Clarke, kenslumálaráðharri tingast við lærarafeløgini um nýskipanir á skúlaøkinum.

## Ongan vinningsskatt

Í gjárkvøldið skuldi amerikanska stjórnin leggja fram eina ætlan, sum skal hjálpa landsins vinnulívi.

New York Times visti í gjár at siga, at stjórnin ætlar at strika skattin, sum partaeigarar rinda av vinningsbýtinum. Verður hetta sett í verk, fer tað at kosta amerikanska ríkiskassanum einar 2.100 milliardir krónur næstu tíggju árini. Men tað er ikki alt, tí sambært blaðnum fer stjórnin at leggja fram onnur uppskot, sum skulu gera, at vinnulívið fer at spara meiri enn 2.000 milliardir krónur afturat.

Floksfelagar hjá George W. Bush, forseta siga, at uppskotið fer at hava stóran bata við sær, og teir vænta millum annað, at virðið á partabrøvum kann fara at hækka heili 20 prosent. Andstøðupolitikarar ávara hinvegin um, at ætlanin hjá stjórnini fer at elva til uppaftur størri stættarmun í amerikanska samfelagnum enn nú.

## Seinasta ferðin

Eftir at hava ferðast næstan 14 ár úti í rúmdini fer fylgisveinurin Galileo at detta niður á gongustjørnuna Jupiter seinni í ár.

Seinastu sjey árini hevur Galileo ferðast kring Jupiter, men nú er útgerðin umborð so nógv slitin, at tey flestu tólini megna bet ein part av tí, sum tey upprunaliga megnaðu. Tess tættari fylgisveinurin kemur Jupiter, tess sterkari verða geiðslingarnar, og tann 21. september endar tann drúgva ferðin. Tá verður Galileo sendur inn ímóti Jupiter, har hann so dettur niður.

Síðani hann varð skotin út fyri skjótt 14 árum síðani hevur Galileo tikið ein hóp av sjáldsomum og vøkrum myndum av Jupiter, ymsum stjørnum og Jørðini.